UTTANRÍKIS- OG FISKIMÁLARÁÐIÐ

Ministry of Foreign Affairs and Fisheries

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

29. juni 2026
Mál: 26/15844-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-130/2025

Svar til § 52 a fyrispurning nr. 52-130/2025 frá Steffan Klein Poulsen, løgtingsmanni, settur Bárði á Steig Nielsen, landsstýrismanni í uttanríkis- og fiskivinnumálum, um føroyska neyðhjálp og menningarsamstarv

Spurningur:

Vil landsstýrismaðurin virka fyri at brúka føroyskar hjálparfelagsskapir og felagsskapir, sum føroyingar virka í, til at veita neyðhjálp og menningarsamstarv kring heimin?

Svar:

Landsstýrið letur stuðul til altjóða menningarsamstarv og neyðhjálp sambært løgtingslóg nr. 44 frá 2007 um altjóða menningarsamstarv og kunngerð nr. 72 frá 2008 um altjóða menningarsamstarv. Ásett er, at lógin millum annað skal leggja lunnar undir føroyskari luttøku í altjóða samfelagnum, og at føroysk vitan og føroyskur serkunnleiki, tá ið til ber, eiga at verða gagnnýtt og ment í samband við verkætlanir, ið fáa stuðul.

Vanlig mannagongd er, at stuðulsumsóknir frá føroyskum felagsskapum við altjóða virksemi og felagsskapum við føroyskum starvsfólki ella sjálvbodnum, ið virka á staðnum, har humanitera virksemið verður útint, verða raðfestar, tá ið treytirnar annars fyri at fáa stuðul sambært leiðreglunum eru loknar. Ætlanin er at halda fram við stuðli til altjóða humanitert arbeiði eftir sama leisti. Serliga ætli eg at leggja dent á, at føroysk vitan og føroysk luttøka meira miðvíst verða raðfest í altjóða menningarsamstarvi.

Bárður á Steig Nielsen
landsstýrismaður